## 16 eru nú til reiðar

16 lond hava vunnið sær pláss í HM-endaspælinum. Og hyggja vit eftir listanum, so síggja vit nógvar gamlar kenningar. Tey 16 londini sum higartil hava vunnið sær pláss í HM-endaspælinum eru hesi : Evropa (13 lond): Ongland, Spania, Holland, Týskland, Danmark, Serbia, Italia. Suðuramerika (4 lond, nummar 5 spælir play-off): Brasilia, Paraguay. Asia (4 lond, nummar 5 spælir play-off): Australia, Japan, Suðurkorea, Norðurkorea. Afrika (6 lond): Ghana, Fílabeinsstrondin, Suðurafrika. Talið av luttakandi londum til HM í Suðurafrika komandi summar verður 32.



## Lars og Henke gevast

Svenski landsliðsvenjarin Lars Lagerbäck boðaði í gjár frá, at hann gevst sum venjari. Sama ætlar álopsspælarin Henrik "Henke" Larsson eisini at gera. Svøríki tapti 1-0 móti Danmark leygarkvøldið og vónirnar hjá sviðum at fara víðari til HM eru so at siga knústar. Ì hesum høpi boðaði tí landsliðsvenjarin frá at hann hevur gjørt sítt og letur nýggjar kreftir taka yvir. Henrik "Henke" Larsson sum fleiri ferðir er givin á landsliðnum, men lokkaður aftur gevst eisini. Hann hevur ætlanir um at byrja at arbeiða sum venjari.



# Stóðu ikki mát

**Eingin av føroysku útileikarunum kunnu vera nøgdir við sítt avrik móti Frankaríki. Ikki ein teirra spældi upp til sítt besta, og av tí sama riggaði liðið ikki sum ein eind**



rolant@sosialurin.fo

Rólant Waag Dam

### 1. Jákup Mikkelsen, 66/-149/0

Tá málverjin letur fimm mál fara í gjøgnum og kortini er dagsins maður hjá Føroyum, so sigur tað ikki lítið um hansara avrik. Hevði tað ikki verið fyri Jákup Mikkelsen og hansara træverk, kundi tapið – um illa vildi til – verið tveysiffrað. Serliga bjargingarnar, tá hann móti dystarenda var einsamallur við fyrst Anelka og so Henry vóru í heimsflokki, men liðformaðurin hevði eisini fleiri aðrar serstakliga góðar bjargingar. Eitt avrik, Jákup Mikkelsen kann vera meiri enn nøgdur við, hóast fimm mál fóru í gjøgnum – og tað er ikki ofta, at man kann tað. Frálíkt Jákup!

### 2. Jann Ingi Petersen, 15/0

Toftamaðurin á miðvøllinum slapp at byrja inni, men sannførdi upp á ongan hátt, at hann skal fáa endurval mikukvøldið. Hevði tað trupult yvir fyri Diarra og Toulalan, har hann ofta valdi at vera afturhaldin, heldur enn at taka nærdystirnar sum teir eru. Var ikki nóg avgjørdur í sínum spæli og fekk av tí sama bara ein tíma á vøllinum, tá hann sum fyrsti føroyingurin, púra natúrligt, varð skiftur út.

### 3. Johan Troest Davidsen, 14/0

Fleksibli verjuleikarin varð fluttur yvir á vinstra bakk, har hann royndi tað, hann var mentur. Varð yvirspældur, tá Govou rakti tvørtræið og tapti tó luftdystin við Gallas, tá hann stútaði til 3-0. Kom sjáldan niðan á fronsku hálvuna, men við Thierry Henry sum beinleiðis mótstøðumanni, var tað helst skilagott at halda seg rímiliga langt afturi á vøllinum. Ikki besti dysturin hjá Johan Troest Davidsen.

### 4. Atli Gregersen, 5/0

Víkingurin spældi sín fimta landsdyst, og hóast hann hevur spælt betri enn leygarkvøldið, so spældi hann seg á ongan hátt av liðnum. Hann royndi eisini í stóran mun at spæla enn at sparka, sum oftast er skilabest – eisini móti Frankaríki. Var tó óheppin í samband við fyrsta málið, har Gignac setti hann av uttan stórvegis hóvasták. Fór eisini skeivur av einum innleggi tíðliga í fyrra hálvleiki, har Jákup Mikkelsen tíbetur var vakin og fekk bóltin. Annars var Atli Gregersen rættiliga sjónligur við tað, at hann vann nógvar bóltar við at leggja pressið á Anelka og Gignac, áðrenn hesir høvdu móttikið bóltin.

### 5. Egil á Bø, 10/0

Egil á Bø spældi sín tíggjunda landsdyst leygarkvøldið, har hann varð valdur framum Bartal Eliasen til miðverjuplássið undir liðini á Atla Gregersen. 35 ára gamli miðverjin spældi sum heild ein skilagóðan dyst, men uttan at imponera. Hevði eina umráðandi blokadu, tá hann setti høvdið fyri eitt skot frá Henry tíðliga í seinna hálvleiki, og var ongantíð runnin um koll av franska pressinum, eins og fleiri av hansara liðfeløgum.

### 6. Rógvi Jacobsen, 52/10

Var fyri fyrstu ferð við undir Brian Kerr og var aftur á landsliðnum eftir at hava verið burtur í meiri enn eitt ár. Hevði eina sera trupla uppgávu sum einsamallur áleypari. Royndi tó at arbeiða og kom eisini væl aftur í vøllin í fleiri førum, og stuðlaði soleiðis miðvøllinum. Vann tó ikki eins nógvar luftbóltar sum vanligt, og var í tveimum førum nakað stuttur til frísparksinnlegg frá Súna Olsen. Gjørdi tó vart við seg, við at skumpa undir franska landsliðsvenjaran, tá hesin ikki